## Arbeiðsloysið veksur framvegis



Hagstovan skrivar, at arbeiðsloysið var 5,3 prosent í desember, og er hetta er ein vøkstur uppá 3 prosent stig síðan januar. Árstíðarjavnaðað arbeiðsloysið var 5,3 prosent. 812 mannfólk og 580 konufólk vóru fulltíðararbeiðsleys í desember. Største arbeiðsloysið í desember var í Suðuroy. Tað minsta, 4,3 prosent, var í Vágum og Eysturoy. Í Norðoyggjum, Sandoy og Suðuroy liggur tað omanfyri miðal fyri landið.

## Ársins Leiðarar skulu kjósast

Synergi kunngjørdu í gjár nøvnini á teimum seks, sum eru í uppskoti ðat fáa heiðurin sum ársins leiðari. Ein heiður, sum verður latin á leiðaradegnum, sum verður hildin fríggjdagin. Dómsnevndin, sum tekur endaliga avgerð um, hvør verður Ársins leiðari 2010, hevur nú funnið fram til tríggjar top-kandidatar innan bæði tað privata og tað almenna. Teir tríggir leiðararnir, sum eru í uppskoti innan privatu vinnuna, eru Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum, Hans Andreas Joensen, stjóri hjá Thor, og Jón Danielsen, stjóri hjá Articon. Eisini innan tað almenna skal ársins leiðari kjósast, og eru tey trý, sum eru í uppskot Herman Oskarson, stjóri á Hagstovu Føroya, Tórmóður Stórá, læknafakligur depilsleiðari á psykiatriska depilinum, og Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni.

# Stórur áhugi fyri svínatjógvunum

**- Í hjallinum hjá Norðfra í Norðdepli er sera góður gjóstur, turkingin gongur væl, og nú er skorpa komin á, sigur Johan Mortensen, stigtakari til forvitnisliga verkætlan**

SKINKUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Skinkuframleiðsla kann ríka og fjøltátta føroyskt vinnulív.

Tað er Johan Mortensen, slóðbrótari, sannførdur um.

Saman við øðrum góðum kreftum er hann farin undir eina forvitnisliga royndarverkætlan at turka svínatjógv í Føroyum.

Verkætlanin skal staðfesta, um tað er møguligt at turka svínatjógv úti í føroyskari luft, sum síðan kunnu framleiðast til unikkar og kostnaðarmiklar skinkuvørur, har kiloprísurin fyri bestu skinkuna liggur heilt uppi á 600 krónum fyri kilo.

Í heyst vórðu nøkur svínatjógv soleiðis hongd upp á trimum støðum í Føroyum – í Norðdepli, vesturi í Bø og í Stóru Dímun.

### Sær gott út

Johan Mortensen sigur, at hann júst hevur verið í Norðdepli, har svínatjógvini hanga í hjallinum hjá virkinum Norðfra.

- Í hjallinum er sera góður gjóstur, turkingin gongur væl, og nú er skorpa komin á. Nakrar "skinkur" verða nú smurdar við svínafeitti, sum vit hava fingið úr Danmark. Hetta verður gjørt fyri, at tjógvini ikki skulu gerast ov turr.

Johan sigur, at enn er ikki greitt, um neyðugt yvirhøvur verður at smyrja tjóvini, men hetta fara royndirnar eisini at vísa, sum tíðir gongur.

- Kanska hevði tað verið eitt hugskot hjá føroyskum bóndrum at smurt gongulimirnar á seyði, sum hanga til turkingar, við feitti úr seyði, sigur hann.

### Stórur áhugi

Johan Mortensen sigur, at tað er sera stórur áhugi millum manna fyri skinkuverkætlanini, og sjálvur er hann sera spentur eftir at vita, hvussu henda fyrsta royndin fer at eydnast.

- Henda ætlan kann koma at ríka og fjøltátta føroyskt vinnulív, er slóðbrótarin sannførdur um.

Samstarvspartarnir hjá honum eru ikki hvørjir sum helst. Stóri danski svínaframleiðarin, Danish Crown, letur rávøruna til verkætlanina, og kendi danski slaktarin, Jens Munch, sum rekur Slagter Munch í Skagen, er eisini við sum ráðgevi.

Aðrir partar, sum eru við í verkætlanini, eru Leif Sørensen, kokkur á Hotel Føroyum, Pál Weihe, granskari, Mortan í Hamrabyrgi og bóndurnir, Óla Jákup í Dímun og Gutte Guttesen, eins og fiskaframleiðarin á Norðfra í Norðdepli, Jógvan Høj.



*Tilsamans 16 svínatjógv hanga nú til turkingar á trimum støðum í Føroyum. Her er Johan Mortensen í hjallinum hjá Norðfra í Norðdepli, har turkingin at síggja til gongur væl*

# Nýggjur Samkeyp-handil í Saltangará




HANDIL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um dagarnar er nýggjur Samkeyp-handil latin upp í Saltangará.

Handilin er í bygninginum í Saltangará, har Maskinhandil var í nógv ár.

Hetta er beint hinumegin vegin, har eitt nú Teymavirkið er á niðaru síðu.

Felagið, sum rekur nýggja handilin, er Sp/f 11/11-94, og tað er Eivind Jacobsen á Strondum, sum er maðurin aftanfyri felagið.

Frammanundan eru aðrir matvøruhandlar í Runavíkarøkinum, men nú hava fólk so hendan møguleikan aftrat.

Sosialurin fer seinni at hava grein um nýggja matvøruhandilin í Saltangará.